DAGSINS MEINING

Seming má roynast alla tíðina

Verkfallið fer nú at merkjast av álvara, og almenningurin er farin at spyrja, hvat semingsmenninir gera. Tað liggur ein sera stór ábyrgd á semingsmonnunum. Teir eru av samfelagnum settir til at syrgja fyri, at partarnir í eini arbeiðsósemju finna saman og gera semju. Tí hevur semingsstovnurin pr. definitión tann neyðturviliga myndugleika og førleika at fara inn í eina arbeiðsósemju, tá hann heldur møguleika og útlit vera fyri semju.

Hetta merkir so aftur, at semingsstovnurin ikki kann vera óvirkin og seta seg upp afturá at bíða til annar parturin gerst moyrur og krýpur til krossin. Spurningurin er, um ikki Semingsstovnurin eigur at vera virkin alla tíðina og at eftirkanna støðuna til tess at vita, hvørjir møguleikar eru til staðar. Møguleikarnir eru jú altíð har. Tað ræður bert um at avlesa partarnar og fanga hvørt minsta glopp í verjuni hjá pørtunum.

Partarnir hava jú eins og hersettir býir í forum víðgyrt seg og byrgt seg sjálvar inni. Men samstundis, so vita vit av royndum frá verkføllum áður, at partarnir alla tíðina senda út signal, sum vísa hvar teir eru í sínum umhugsingum og stoðumetingum.

Endamálið við semingsstovninum er m.a., at hann skal hjálpa til at fáa hesar innibyrgdu stríðandi partar til at gloppa borgardyrnar – at læsa upp fyri eini læstari støðu. Ein kann tí spyrja, um semingsstovnurin ikki eigur at vera aktivt lurtandi, til tess at fanga hvørt minsta tekin um samráðingarvilja hjá øðrum ella báðum pørtum. Tað liggur tí ein sera stór ábyrgd á Semingsstovninum, tá arbeiðsósemjan er komin hartil, sum hon er nú. Stovnurin skal ansa eftir, at hvørgin av pørtunum tekur skaða. Hann skal tryggja, at fakfeløgini ikki fara so langt út, at tey í síðsta enda standa við svartaperi, hóast tey kanska í síðsta enda fáa ein dyggan vøkstur í krónum og oyrum. Og Semingsstovnurin hevur skyldu at ansa eftir, at samfelagsvirði ikki fara fyri skeyti av verkfallinum.

Her liggur ein sera stór ábyrgd á semingsstovninum og á semingsmonnunum og fáur man øvunda teimum hesa ótakksomu uppgávu. Hinvegin er tað ein spurningur, um ikki tíðin er farin frá eini semingsstrategi, har bíðað verður í frið og náðum til annar parturin hoyknar í knøunum. Er ikki tíðin nú komin til at nýta eina meira virkna, kreativa og visionera semingsstrategi? Vit spyrja bara í bestu meining, uttan at vit á nakran hátt ynskja at sáa iva um semingsstovnin ella at skapa trupulleikar kring virksemi stovnsins.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ringa samvitskan hjá Høgna

Eilif Samuelsen

Onkuntíð kann man ivast í, um Høgni Hoydal er ein veruligur politikari ella bara eitt spøkilsi, sum heldur til ávíkavist á Tinganesi og í sjónvarpsstovuni. Veruleikin tykist honum ofta fjarur, og sjálvur ger hann nógv fyri altíð at halda seg burtur frá veruligu umstøðunum.

Hvussu ofta hava føroyingar ikki hoyrt Høgna Hoydal, táið hann í sjónvarpi ella útvarpi fær onkran nærgangandi spurning, siga: "Tað var als ikki hatta eg segði, tvørturímóti....", "Nei, hatta er púrasta miskilt" ella "Hatta er eitt samgongumál, og tað havi eg als onga viðmerking til" sum um samgongumál ikki koma Føroya fólki við.

Fyri at sleppa undan at taka støðu til veruleikan, livir Høgni so dyggiliga eftir ráðunum, sum Bøjgen í sjónleikinum hjá Henrik Ibsen gevur Peer Gynt: *Gå udenom, Peer!*

Tað ber heilt einfalt ikki til at konfrontera Høgna Hoydal við nakað, sum hann hevur sagt, og at síggja til ber heldur ikki til at konfrontera Høgna við tað, sum hann hevur skrivað svart uppá hvítt. Í so máta er svar hansara til mínar viðmerkingar til røðu hansara á aðalfundi Lærarafelagsins eitt skúladømi um machiavellistiskan máta at verja seg sjálvan uppá.

Høgni ger ikki viðmerkingar til tað, sum eg beri fram, men til tey orðini, sum hann sjálvur leggur mær í munnin, og so er ikki lætt at koma afturíaftur. Heldur enn at gjøgnumganga allar rangsnúgvingarnar hjá Høgna, skal eg bara gera viðmerkingar til onkur punkt.

Ein góður skúli kostar

Tað gleðir meg, at Høgni rósar nýggju fólkaskúlalógini upp til skýggja og sigur, at ótrúliga nógv gott arbeiði er gjørt á skúlunum við nýggju lógini. Hetta taki eg sum eitt prógv um, at verkið hevur hepnast framúr vel. Tjóðveldisflokkurin bardist við hond og fót ímóti, at lógin varð samtykt og legði í smáligari øvund allar møguligar forðingar í vegin. M.a. vildu hann hava, at landsstýrið frammanundan skuldi útvega teir neyðugu figgjarkarmarnar, sum lógin fór at vera atvold til í framtíðini.

Høgni Hoydal kann hava rætt í tí, at um landsstýrið hevði lagt upp fyri teimum krøvum, sum Lærarafelagið sjálvandi fór at koma við orsakað av øktari arbeiðsbyrði, so hevði hann havt tað munandi lættari. Men eg kann vissa hann um, at so hevði hann ikki sloppið við at hækka játtanina til fólkaskúlan við 73 milliónum hesi fimm árini. Tí ein góður fólkaskúli kostar. Og hann er hvørja krónu verdur. Prísurin verður í stóran mun ásettur gjøgnum samráðingar millum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið. At Høgni Hoydal og flokkur hansara hava fingið ilt av at innfría krøvini, tað er ein onnur søk, sum kanska ikki hevur so nógv við tann góða fólkaskúlan at gera.

Tað tekur langa tíð at seta eina fólkaskúlalóg í verk, fleiri ár. Nýggir møguleikar taka seg upp og skúlin mennist so við og við av dugnaligum fólki innan skúlagátt, og hendan menningin hevur ofta ávísar útreiðslur við sær.

Men tað sum øll onnur høvdu uppfatað sum menningarvirksemi, tað kallar Høgni Hoydal í sínum smásinni at "rudda upp".

Høgni stendur í stað

Høgni Hoydal sigur, at teir hava brúkt øgiliga orku uppá at fáa sett í verk møguleikarnar í nýggju lógini, tí einki var fyrireikað av undanfarna landsstýri. Kennir Høgni Hoydal ikki tær leiðbeinandi lesiætlanirnar og tey álitini, sum vórðu gjørd undan lógini?

Og so rósar hann Signari á Brúnni fyri at hava sett skúlastýrini í verk. Ja, Sambandslandsstýrið slapp ikki at halda fram, so vit kundu fullføra verkið. Signar slapp heldur ikki at virka leingi vegna karaktermorðið, sum varð framt á hann. Fleiri tjóðveldislandsstýrismenn komu seinni kropp á kroppi, og eisini teir fingu smáar møguleikar at fremja nakað sum helst.

Taka vit støði í veruleikanum heldur enn føgru orðum Høgna, so hevur Tjóðveldisflokkurin einki sum helst fingið á skaftið hesi fimm árini, hann hevur sitið í landsstýrinum, og tað er ikki bara í skúlamálum. Fullveldisglæstriborgin er eisini hoknað saman. Grønlendingar, sum nústaðni eru farnir undir sína sjálvstýrisgongd á hóvligan demokratiskan hátt, vinna ein sigurin fyri og annan eftir. Høgni hevur bert ósigrar at síggja aftur á, tí tað sum higartil hevur eyðkent Tjóðveldisflokkin í landsstýrissamgongu er háflovgt og veruleikafjart tos og ongar gerðir.

Ei undur í, um hann er frustreraður.

Tí er lætt at skilja at Høgni Hoydal hevur ilt í samvitskuni og tískil noktar at fyrihalda seg til tann partin av veruleikanum, sum hann sjálvur hevur ábyrgdina av vegna Føroya fólk.

Góðir dagar í Vilnius

NORRØNAFELAGIÐ
Tíðindaskriv

Fyri fyrstu ferð verða norðurlendskir dagar í Litava í summar. Teir vera í høvuðsstaðnum Vilnius frá 30. juni til 8.juli. Á skránni eru tónleikur og dansur, framsýninger og ráðstevnur, millum annað um samstarv millum Litava og Norðurlond. Litavisk mentan og søga eru annars høvuðsevnið á skránni.

Um somu tíð er 750 ára haldið í sambandi við, at Mindaugas kongur varð krýndur í 1253, og grundarlagið lagt undir litaviska statinum..

Limir í norrønu feløg-unum eru vælkomnir til norðurlendsku dagarnar í Vilnius. Luttøkugjaldið er 120 evrur fyri tey, sum tekna seg og gjalda fyri tann 20. juni. Eftir 20. juni er gjaldið 150 evrur. Harafturat koma 15 evrur um dagin fyri tiltøkini, sum verða fyriskipað. Gistingin kostar úr 77 evrum um samdøgrið. Og so kemur ferðin aftur og fram afturat. Tilfar um norðurlendsku dagarnar í Vilnius fæst hjá Norrøna Felagnum í Føroyum.

Baltalondini hava stóran hug at vera við í norðurlendska samstarvinum. Norrøna felagið í Litava, Norden Lietuva, varð stovnað í 1997.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hvørjar almennar útreiðslur eru neyðugar

Finnur Helmsdal

Oman á alt rokið, sum stóðst av 2. viðgerð av málinum um uppihaldspening, kemur landsstýrismaðurin í almannamálum við fráboðan um, at hann ætlar at leggja málið fram aftur aftan á ólavsøku. Skal ikki fara í smálutir viðvíkjandi órógvandi foreinklingini av málinum og annars roynd-unum at rættvísgera tað. Tó eru nógv onnur og sera týðandi viðurskifti tengd at málinum enn tey, landsstýrismaðurin ber fram. Í veruleikanum kann málið gerast byrjanin til eina uppgerð um, hvørjar almennar útreiðslur eru neyðugar. Eingin ivi skal valda um, at hendan uppgerðin er bæði neyðug og gagnlig, men er talan í hesum føri er um mál, tilvildarliga tikið úr rúgvuni, og spurningurin er, um Tjóðveldisflokkurin er til dystin fús at arbeiða soleiðis við einum so vitali spurningi, nevniliga hvørjar útreiðslur eru neyðugar almennar útreiðslur, og hvørjar eru tað ikki.

Fari til stuttleika at royna at greina eitt yvirlit yvir, hvørjar útreiðslur viðvíkjandi børnum eru almennar, hetta m.a. fyri at vísa á, hvussu tilvildarligt og ivaleyst eisini órættvíst tað er, soleiðis at hála teppið undan so nógvum.

Vit kosta frá byrjan

Longu langt áðrenn vit koma í verðina, eru flestu okkara almenn útreiðsla, eftir mínum tykki neyðug almenn útreiðsla. Tá kvinna hevur varhugan av, at hon er við barn, fer hon til lækna. Og er hon við barn, fer hon regluliga bæði til lækna og jarðamóður. Hon verður kanska skannað. Hon fer kanska úr arbeiði í ótíð. Og tá tíðin er komin, fer hon á føðideild. Tá mamma og barn eru heimkomin, skal mamman vera heima hjá barninum í minst seks mánaðar, men skal hava løn allíkavæl.(við tíðini fer pápin nátúrliga at taka sína helvt av barnburðarfarloyvinum, við hesum økist frælsi kvinnurnar, men verður av teirri orsøk ikki talan um lægri almennar útreiðslur, heldur hinvegin.). Hon fær vitjan av heilsusystir, fer til barnakanning. Tá barnið er hálvt ár, fer tað kanska í vøggustovu ella aðra pleygu. Sleppur barnið ongan veg, kann mamman ikki fara til arbeiðis, og so skulu hon og kanska eina ferð pápin framhaldandi hava løn frá tí almenna. Fyrr ella seinni sleppur barnið á stovn, og gjalda foreldrini tá ein triðing av kostnaðinum, tað almenna ella rættari kommununar restina. Tey foreldur, sum ikki hava góð ráð, tey fáa heilt ella lutvíst fríplass. Umframt regluligar læknakanningar fær barnið tilboð um at vera kannað av tannlækna eisini. Serútbúgvin fólk frá Sernámsdeplinum vitja stovnarnar. Barnið fer í skúla, og fær aftur samband við heilsusystrar. Tey, sum ikki klára seg fáa tilboð um serundirvísing, onkur fær stuðul. Børnini fáa tilboð um frítíðaraktivitetir, sum eisini verða almennt stuðlaðir. Tey børn, sum ikki finna javnvágina og annars ikki klára seg í vanligum umfari við onnur, tey kunnu koma í samband við barnaforsorgarmyndugleikar ella undir onnur serlig átøk.

Talan er um stórar almennar útreiðslur frá byrjan, og hóast ein kanska kundi hugsað sær okkurt øðrvísi ella heilt øðrvísi, so er talan um neyðugar almennar útreiðslur. Oman á alt hetta halda myndugleikarnir, at foreldur eisini skulu stuðlast á annan hátt, tá tey hava børn. Her verður fyrst og fremst hugsað um barnafrádráttin í skattinum.

Tá børnini ikki koma

Tað almenna stendur eisini til reiðar at gjalda, tá børnini ikki vilja koma. Tá einki úrslit kemur burtur úr nátúrligu royndunum, verða menn og kvinnur gjøllað kannað. Tey fáa tilboð um viðgerð, um alternativar møguleikar og um at ættleiða. Viðgerðin og alternativu royndirnar eru ókeypis, meðan tað almenna veitir stuðul til ættleiðing. Alt hetta verður gjørt, tí vit halda tað vera ein mannarætt at fáa okkara egnu børn, ella at vit sleppa at uppala børn. Talan er tí um neyðugar almennar útreiðslur.

Tá børnini eru óynskt

Tað kemur meira enn so fyri, at kvinnur gerast við barn, hóast tær als ikki hava ynskt at blíva tað. Skal ikki fara í smálutir, hví barnið kann vera óynskt, men møguleikarnir eru fleiri at sleppa undan avleiðingunum. Læknin kann geva kvinnuni irðanarbolla, um hon kemur í tøkum tíma. Kvinna kann fáa fosturtøku, her ella aðrastaðni, og eigur hon tá at fáa neyva og viðkomandi ráðgeving. Tað ber eisini til at lata ókend ættleiða nýfødda barnið, men er hendan loysnin meiri sjaldsom nú. Hetta er ikki tann mest tespiligi parturin av søguni, men kostar hann alt annað líka eisini almennar pengar. Nøkur halda, talan er um neyðugar almennar útreiðslur, onnur eru ósamd.

Tá fólk skiljast

Tað kemur tíverri eisini alsamt oftari fyri at fólk, sum hava fingið barn ella børn saman, fara hvør til sítt. Myndugleikar koma upp í, onkur roynir at mekla, aðrir myndugleikar gera úrskurð. Enn eitur einki felags foreldrarættur her á landi, og búgva skilnaðarbørn vanliga hjá mammuni, sum eisini hevur allan foreldrarættin. Hesum hevur mamman útreiðslur av, og fær hon tí barnapengar, kanska konugjald og barnafrádráttin í skattinum. Í nøkrum førum er talan um hækkaði gjøld, er inntøka mansins yvir eitt ávíst. Einligar mammur fáa ofta fríplass á stovni. Pápin, sum skal rinda barnapening og kanska eisini konugjald, fær eina helvt av hesum útreiðslunum endurgoldnar úr landskassanum. Flestu halda, at útreiðslur landskassans í samband við hjúnaskilnað eru neyðugar, meðan onnur eftir øllum at døma ikki eru fult samd.

Hví júst fráskildu páparnir

Nú kunnu flestu okkara skjótt gerast samd um, at støðan hjá nógvum einligum mammum er alt annað enn góð. Og eiga myndugleikarnir eisini at seta hesi viðurskifti undir luppin. Tó verður støðan hjá einligu mammunum og fyri so vítt eisini børnum hennara ikki petti betri, um vit hála teppið undan fyrrverandi drongi ella manni hennara. Støða mansins kann ikki einfaldgerast við at seta krónutalið upp og so býta við tvey, og síðan sammeta hetta býtta krónutalið okkurt tilvildarligt. Landsstýrismaðurin nýtti ølkassan sum dømi, tú kann nýta ein gott bowlingkvøld, ein einvegis túr til Suðuroyar fyri fýra við bili, og tú kann nevna óteljandi dømi. Men støðan er tíverri ikki so einføld. Var hon tað, var gaman í at taka undir við uppskotinum. Talan er fyri tað fyrsta ofta um fleiri enn eitt barn, og talan er rættiliga ofta um útreiðslur oman á tær, pápin nú hevur í øðrum hjúnalagi ella leysagiftu. Kanska eru onnur børn á skránni, onnur hús o.s.fr. Pápar hava eisini ofta aðrar og stórar útreiðslur umframt uppihaldspeningin at gjalda. T.d. tá hann skal hava samkvemm við børn, sum búgva í t.d. Danmark. Nógvir fráskildir pápar eru, sum er, kanska eins illa staddir og illa støddu fráskildu mammurnar. Skulu teir nú missa endurgjaldið fyri uppihaldspeningin, verður støðan hjá fleiri teirra so ring og so álvarslig, at hon kann elva til álvarsligar figgjarligar, sálarligar og sosialar avleiðingar fyri ikki bert teir, men eisini eitt ótal av kvinnum og børnum.

Talan er í veruleikanum um eina evarska lítla sparing, tilvildarliga vald úr rúgvuni, og sum tí heldur ikki fer at muna nevnivert í royndunum at fáa ein sjálvberandi búskap. Sparingin kann hin vegin lættliga hava so álvarsligar avleiðingar við sær, at sosiala skipanin skjótt stendur við einum nýggjum slagi av viðskiftafólkum, sum fara kosta nógv meira enn ætlaða sparingin kanska fer at geva.

Eru almennar útreiðslur neyðugar

Nú hevur tað leingi verið ein illa duld almenn loyna, at ein fittur partur av samgongumanningini halda, at vit hava ov nógvar og stórar almennar útreiðslur. Og munnu flestu vera samd í tí, at almenni peningurin langt frá altíð er best gagnnýttur. Nú veit eg ikki, um tað loysir seg at skjóta upp fyri samgonguni at viðgera spurningin um hvørjar almennar útreiðslur eru viðkomandi og neyðugar, og hvørjar ikki eru tað. Men eg fari í hvussu er at skjóta hetta upp fyri Tjóðveldisflokkinum, m.a. tí flokkurin fyri egnar sakir og ikki minni fyri veljarans eigur at melda greitt út á hesum øki. Hugsa vit t.d. um allar tær almennu útreiðslurnar, eg havi nevnt omanfyri, so er bert tann eina tikin úr rúgvuni og skal konverterast til brúkaragjald. Hvør verður so næsta, og eru vit nú av álvara farin undir at konvertera, tað vit higar til hava mett sum neyðugar almennar útreiðslur, til brúkaragjøld? Hendan uppgerð og eftirfylgjandi útmelding er neyðugt, ikki minst tá vit hugsa um, at eitt av fremstu málum politikaranna er, at fremja eitt so rættvíst býti av skattakrónum og øðrum almennum pengum, sum tilber.

Úr oman fyri standandi kunnu fólk lesa grundgevingar mínar fyri ikki at taka undir við uppskotinum um at avtaka stuðulin til uppihaldspening. Lesarin sær sostatt, at grundgevingar mínar ikki bygdu á øvundsjúku og maktgirnd. Grundgevingin var hugsjónarlig og ein saklig meting av avleiðingunum, varð uppskotið samtykt.

Eg fari tí staðiliga at heita á landsstýrismannin, samgonguna, flokkin og ikki minst figgjarnevndina um ikki at fremja ætlaðu sparingarnar viðvíkjandi uppihaldspeninginum. Uppskotið ger ikki støðuna hjá nøkrum samfelagsbólki betri, bert versnar støðan hjá pápunum, og teimum hann varar av, munandi. Hugsið heldur um, hvussu vit betra um støðuna hjá framtíð okkara, nevniliga okkara børnum. Sjálvsagt er tað í lagi at spara, har sum sparast kann. Og møguleikarnir eru fleiri. Hetta krevur bert, at politikararnir have neyðuga dirvið at traðka á tærnar ávísum veljarum. Hetta dirvið tykjast okkara politikarar tíverri ikki at hava, og tí loypa teir um garðin, har hesin er lægstur.

Hvat *sigur* Høgni, tá hann tosar?

Sigfríður Olsen

Nú arbeiðarafeløgini eru farin í verkfall, hevur ein ávísur orðadráttur tikið seg upp millum feløgini og samgonguflokkarnar. Í Útvarpinum herfyri var samrøða við umboð fyri allar politisku flokkarnar, og fingu hesi har høvi at gera sínar viðmerkingar til støðuna á arbeiðsmarknaðinum. Tað, ið eg serliga beit merki í, vóru viðmerkingarnar frá formanni Tjóðveldisflokksins. Honum dámdi als ikki, at arbeiðarafeløgini "høvdu hongt seg og hinar samgongupolitikkarnar á nakrar knagar," sum hann málbar seg, og minti á, at Tjóðveldisflokkurin so sanniliga hevði tónað reint flagg t.d. í fiskimmannafelagsverkfallinum í 50-unum o.s.fr. Fyri mær ljóðar hetta sum, at tað er ein farin tíð.

Og júst hetta viðger hann nærri í hesi somu útvarpssending. Hann mælir rættuliga avgjørdur til, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu sjálvir loysa sínar ósemjur, uttan at politikkarar verða drignir uppí, og ei heldur skulu teir blanda seg uppí.

Fyri ikki so langari tíð síðan samráddust maskinmeistararnir hjá SEV og arbeiðsgevarar teirra um ein nýggjan sáttmála. Óivað hava báðir partar verið væl nøgdir við úrslitið, annars varð sáttmálin sjálvsagt ikki undirskrivaður. Hesar samráðingar eru farnar fram akkurát soleiðis, sum formaður Tjóðveldisfloksins ynskir, at samráðingar skulu fara fram. Har var, eftir øllum at døma, ikki tað stóra hóvastákið, og tað vóru ikki nógv, íð góvu sær far um henda sáttmála, gjørdur í sátt og semju. Men so hendir tað, at figgjarmálaráðharrin blandar seg uppí, hann vil ikki góðkenna sáttmálan, og reystina av søguni kenna helst allir føroyingar.

Nú skuldi ein trúð, at formaður Tjóðveldisfloksins fór at ilskast inn á figgjarmálaráðharran fyri at blanda seg uppí partarnar á arbeiðsmarknaðinum. Men nei, her fóru vit so ruddiliga skeiv, tí í hesi somu sending, ja næstan í sama andadrátti, sigur formaður Tjóðveldisfloksins, at figgjarmálaráðharrin fær fulla uppbakking frá sær.

Hetta er so sanniliga heldur ikki fyrstu ferð, at formaður Tjóðveldisfloksins er í andsøgn við sjálvan seg, og haldi eg, at hann sleppur alt, alt ov væl við tí.

So gott í tykkum, føroyingar: Hugsi um tað, íð Høgni sigur, tá hann tosar, væl at merkja, áðrenn hann kemur til "og so framvegis" ella "og so víðari," tí tá er nærliggjandi at hugsa, at ein væl inniballað, hálvgum loddrøtt er avleverað.